# Mál á skránni

**Millum annað hesi mál vórðu viðgjørd á býráðsfundi hjá Tórshavnar býráði hóskvøldið**

TÓRSHAVN
*Heri á Rógvi*

### Argja skúli

Arbeitt verður við tveimum ætlanum viðvíkjandi Argja skúla. Jan Christiansen sigur, at býráðið ásannar, at skúlin er illa sperdur, og tískil mugu stig takast fyri at betra umstøðurnar.

Arbeitt hevur verið við einari ætlan at keypa bygningin hjá Postverki Føroya á Argjum. Hesar samráðingarnar hava verið truplar, tí landið eigur bygningin, og Postverkið fer væntandi ikki at fáa ágóðan av einari sølu.

Tosað verður um ein leigusáttmála, men hetta er ikki komið undir land enn.

Bygningurin hjá Postverki Føroya verðurhildin at vera stak væl egnaður.

Samtundis verður arbeitt við einari ætlan at útbyggja verandi skúla á Argjum.

Talan er um eina verkætlan fyri 12,55 mió. og fer at merkja seks nýggjar skúlastovur umframt onnur høli.

Eisini skulu umbyggingar gerast í verandi høli fyri fýra milliónir.

Tórshavnar býráð samtykti hóskvøldið at játta 3 mió. til verkætlanina í ár. Hetta er partur av einari størri ætlan fyri skúlarnar í høvuðsstaðnum, sum serliga fara at merkja fíggjarætlanina hjá Tórshavnar kommunu í 2004.

### Dagstovnar

Málið hjá verandi meiriluta í Tórshavnar býráði er at fáa allar bíðilistar til ansingarpláss av vegnum í Tórshavnar kommunu. Hetta verður sagt við eitthvørt høvi, og borgarstjórin, Jan Christiansen, nýtti høvi til at nevna hetta, tá hann legði ætlanina um tveir nýggjar barnagarðar fyri fjølmiðlarnar.

Annar barnagarðurin er í Hoyvikshaganum Suður. Hesin stovnurin fer at rúma 72 børnum í alt – 24 vøggustovubørnum og 48 barnagarðsbørnum.

Samlaði kostnaðurin verður 11,6 mió.

500.000 kr. verða játtaðar í 2003 til prosjektering.

Í 2003 verða 39 milliónir nýttar til at byggja nýggjar dagstovnar í Tórshavnar kommunu.

Níggju av hesum milliónum verða nýttar til ein dagsstovnin Sólareygað við Sundsvegin. Hesin skal vera meinlíkur dagstovninum í Øksnagerði, og tað verða somu arkitektar, ið fara at stevna fyri verkætlanini. Dagstovnurin Sólareygað fer at hýsa 64 børnum – 24 vøggustovu og 40 barnagarðsbørnum.

3,4 mió. skulu játtast í 2004, soleiðis at samlaði kostnaðurin verður umleið. 12,4 milliónir við innbúgv og meirvirðisgjaldi.

Somuleiðis fara níggju milliónir til ein dagstovn við Landavegin.

# Havnin og Kirkjubøur leggja saman



*Til komandi býráðsval í Havn verða Annfinn Brekkstein og Jan Christiansen væntandi á hvør sínum lista. Men inntil víðari eru teir borgarstjórar í hvør sínari kommunu tætt at hvørjum øðrum.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Kirkjubøar kommuna ynskir at samráðast við Tórshavnar kommunu um eina samanlegging. Hóast einki er avgreitt, verður tað væntandi ikki leingi til Kirkjubømúrurin verður partur av tí deiligu Havnini**

SAMANLEGGING
*Heri á Rógvi*

Tann deiliga Havn er eitt av herrópunum hjá Tórshavnar kommunu. SMS plagar at nýta orðini »Ein býlingur í Havn« til sínar lýsingar.

Alt hetta kann væntandi innan leingi nýtast um Kirkjubømúrin. Tí fólk í Kirkjubø og á Velbastað vilja nevnliga sleppa upp í Tórshavnar kommunu.

Eitt einmælt bygdarráð í Kirkjubøar kommunu hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við eini ynski um samanlegging við Tórshavnar kommunu – ella rættari sagt realitetssamráðingar um samanlegging.

Og samráðingarnar skulu longu vera lidnar í juni mánað.

Tórshavnar kommuna og Kirkjubøar kommuna hava sum er eitt samstarv. Í fjør varð samstarvsavtala gjørd millum kommunurnar, sum millum annað merkti, at íbúgvarnir í Kirkjubø og á Velbastað kundu nýta allar fasilitetir hjá Tórshavnar kommunu og øvugt fyri ávís gjøld.

Samstarvið verður á flest øllum økjum, og stigið herfrá til at leggja kommunurnar saman er kanska ikki so stórt.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, sigur, at kommunan hevur hollar royndir í at leggja kommunur saman við Kollafjarða, Argja, Kaldbak og aðrar kommunur seinnu árini.

Býráðið er eisini positivt innstillað fyri einari samanlegging.

Ein nevnd við umboðum fyri báðar kommunurnar er sett, og nevndin fer til verka sum skjótast. Arbeiðið skal sum sagt longu vera liðugt í juni.

Í Kirkjubøar kommunu, ið fevnir um Kirkjubø og Velbastað, búgva eini 230 fólk og kommunan hevur 69 husarhald. Kommunan er væl fyri, og stórar ætlanir er um at stykkja út til sethúsabygging.

Jan Christiansen vil ikki kalla samráðingarnar fyri ein avgreiðsluspurning, tí nógv ting eru at samráðst um, og enn er einki komið upp á pláss.

# Umhvørvisátak í Havn

**Tórshavnar kommuna er farin undir eitt størri umhvørvisátak**

TÓRSHAVN
*Heri á Rógvi*

Tórshavnar kommuna hevur stórar ætlanir um at betra umhvørvið í kommununi. Brennistøðin á Hjalla verður í løtuni umbygd, og fólk skulu í framtíðini venja seg við at skilja burturkastið.

Ruskspannir til at skilja papp og pappír frá verða latin hvørjum húsarhaldum. Í tætt bygdum økjum, ávísum býlingum, verða smærri byngjur tøkar.

Ein royndarverkætlan koyrir í løtuni í ávísum pørtum av Havnini, men í framtíðini skulu øll í høvuðsstaðnum venja seg við tankan.

### Búmerki – og tó

Sum partur av hesi ætlan kommunan farin undir eina herferð. Til hesa herferð vildi kommunan eisini hava eitt búmerkið, og tí varð ein kapping útskrivað.

Hendan kapping gav eisini fleiri hugskot og nógva umrøðu, men einki uppskot kundi í roynd og veru nýtast til nógv annað enn at hanga upp í Snarskivuni.

– Vit fara heldur at fáa gjørt eitt professionelt búmerki á einari lýsingarstovu, sigur Niels Uni Dam, starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu við kunningarviðurskiftum um hendi.

Vinnarin av kappingini gjørdist Martin W. Tórgarð, yngri. Hann fær 15.000 kr. fyri ómakin.

Virðislønir vórðu eisini latnar til Ìvar og Janus Guttesen og Poul Helga Jacobsen.




*Í framtíðini skal burturkastið hjá borgarunum í Tórshavnar kommunu skiljast. Ein tílik "byngja" verður at síggja í tættbýgdum økjum og býlingum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Láturlig avgerð hjá Oljumálaráðnum

BYGGING
*Heri á Rógvi*

Jan Christiansen er til reiðar at fara í Føroya rætt við málinum um byggingina í Vallalíð. Hann heldur avgerðina hjá Oljumálaráðnum vera láturliga skeiva.

– Skulu vit nú til at steðgað við at kalla allari bygging, og byggingin seinastu nógvu árini er ikki lóglig, spyr borgarstjorin.

Tað er serliga tulkingin hjá Oljumálaráðnum av orðinum »rúm«, sum Jan Christiansen heldur vera fullkomiliga burturvið.

Tað snýr seg um, at byggisamtyktin sigur, at »rúm skal vera fyri stovnum í A1 økjunum«.

Hetta metir Oljumálaráðið sum um, at talan er um rúm í bygningum og ikki sjálvstøðugar stovnar.

Og hetta heldur borgarstjórin vera eina láturliga tulking.



*Arbeiðsmenninir hjá Tórshavnar kommunu fara ikki at steðga, og borgarstjórin heldur, at Oljumálaráðið fullkomiliga er farið av leið.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggj skrásetingargjøld fyri skip

**Fyri at skapa størri inntøkur til Fiskimálaráðið, fer Skipaskrásetingin at krevja skrásetingargjøld fyri pantabrøv, ognarbrøv o.o**

SKRÁSETING
*Heri á Rógvi*

Sum partur av semjuni í sambært við fíggjarlógini fyri 2003, skuldi Fíggjarmálaráðið fáa meira pening til vega.

Vit kunnu kanska kalla tað eina øvugta sparing, sum í síðsta enda gevur sama úrslit – Fiskimálaráðið skal geva landskassanum eitt betri støði.

Talan er eitt nú um skrásetingargjøld fyri pantabrøv, ognarbrøv og útflýggjan av tjóðskaparbrævi.

Gjøldini, sum síggjast aðrastaðni á síðuni, eru galdandi fyri øll skip við eini bruttoregistartonsatali ella bruttotonsatali upp á 15 ella yvir, sum eru skrásett í Føroya Skipaskráseting, ella sum skulu skrásetast í Føroya Skipaskráseting.

Talan er um føst gjøld fyri ymsar skrásetingar. Rættiliga nógv skip og reiðarí fara at merkja broytingina.

Hugsast kann, at tey størru skipini og reiðaríini ikki fara at merkja lutfalsliga nógv, men fyri teir einstøku smærri handlar verður broytingin óivað ein tyngjandi byrða.

Eitt nú skal ein gjalda 2.800 kr. fyri skráseting av skipsskeyti, sølusáttmála ella byggiváttan.

Tað var Jørgen Niclasen, fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, ið gjørdi avtaluna við fíggjarnevndina hjá løgtinginum, og Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, ger arbeiðið liðugt.

Kunngerðin verður galdandi frá. 1. mai.

### Samanborið

Samanbera vit hesi gjøldini við onnur gjøld í øðrum londum, sæst at nýggju gjøldini liggja á leið tað sama og eitt sindur hægri enn í Norra og Íslandi. Eitt nú pantubrøvini eru dýrari í Føroyum, men talan er ikki um nakra stórvegis mun.

Í Fíggjarmálaráðnum verður roknað við, at hetta stigið fer at geva landskassanum einar 600.000 kr. árliga, men hetta talið skal takast við fyrivarni, tí tað kann vera ymiskt, alt efir skrásetingunum.




*Øll skip yvir fimtan bruttotons skulu fara at kenna sviðan nýggju skrásetingargjøldnum, sum eftir ætlan fara at geva landskassanum einar 600.000 kr. árliga.*

### Gjøldini

| | |
|---|---|
| Skráseting av fíggjarligum rættindum | 2.200 kr. |
| Skráseting av skipsskeyti, sølumáttmála v.m. | 2.800 kr. |
| Útflýggjan av skrásettum tjóðskaparbrævi | 3.000 kr. |
| Rættingar gjørdar á tjóðskaparbræv | 2.000 kr. |
| Úflýggjan av fyribils tjóðskaparbrævi | 3.000 kr. |
| Ljósavrit av skipsblaði | 200 kr. |